# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2023/2024



## SPURDÓMUR (KANNING UM LUNDAR)



Granskarar: BÓLKUR 4 : Silja,andrea,silas,adreana og jóan magnus

# INNGANGUR

Vit undraðust um lundar eru í Kvívík. Tí vildu vit kannað  hettar  nærri. Vit ringdu til Jens Keld, serfrøðing í fuglum. Spurdu næmingar í skúlanum um tey høvdu sæð lundar í Kvívík. Vit fóru eisini út at vita um vit sóðu nakrar lundar.

Harafturat undraðust vit á aðrar spurningar um lundar. Og vit kannaðu um tað á netinum.


Lærari:

Trina, Maria, Hilda

Email:  ht1806f2@skulin.fo

Luttakarar:

Adriana Hernandez Christiansen

Andrea marquart

Silja jónvá bárðardóttur

Silas ørvarodd

Jóan magnus jacopsen



Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Leggið eina ætlan

4. Savnið upplýsingar

- Samrøða við Jens Keld Jensen, fugla serfrøðing
- Savnaðu upplýsingar online, í bókum og annað.
- Spurnarkanning
- Út at kannað

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sigið øðrum frá

Fylgiskjøl

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Tað var ringt at finnað okkurt at leita um, men vit valdu til endans lundar. Og vit undraðust um lundar mundu vera í Kvívík? Fyrst so lósu vit í fleiri bókum, so fóru vit runt og spurdu næmingar í skúlanum um tey høvdu sæð lundar í kvívík, so ringdu vit til Jens Kjeld og so spurdu vit um har vóru lundar í kvívík. Harafturat fóru vit sjálvi út at kannað um vit sóðu lundar í Kvívík.

Høvuðsspurningar: Eru lundar í Kvívík?

2: hví hava lundar litríkt nev?

3: hvat eta lundar

4: hvar halda lundar til ?

5. hvussu nógv bein eru í einum lunda?

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Vit hildu ikki at lundar eru Kvívík, men vit vildu gjarna kannað um tað er so.  Vit væntaðu at lundar eta fiskar. Vit gittu at tey høvdu 200-250 bein í kroppinum. Vit gittu eisini at nevi og føturnar blíva meira  litríkt um vári, og at tey búgva við har sum nógv vatn er.

# 3. LEGGIÐ EINA ÆTLAN

Vit løgdu eina ætlan um at ringa til Jens Kjeld Jensen, serfrøðing, at spyrja okkum fyri og so gera eina spurnarkanning, har vit spurdu um fólk í Kvívíkar skúla, um tey hava sæð lundar í Kvívík. Eisini vildu vit fara eina kanningarferð í Kvívík, fyri at vita um vit sóðu nakrar lundar.

Harafturat fara vit at finnað okkum vitan og svar uppá okkara spurningar á alnótini og í bókum.

# 4. SAVNIÐ UPPLÝSINGAR

**Samrøða við Jens Keld**:

Vit ringdu til hann og spurdu um lundar eru í Kvívík?Hann saiði nei, men hann visti ikki ordurliga hví og vit spurdu eisini hvar teir halda til, hann segði at flest lundar búgva í Fugloy og Mykinesi tí har eru ongar rottur. Hann segði at teir eta fiskar (nebbasild) og ormar. Vit spurdu um hví teir hava so litríkt nev? Hann svaraði at tað er líka sum, tá gentur koyra makup á og soleiðis vera meiri tiltrekkjandi. Hvussu nógv bein teir hava í kropinum, visti hann ikki ordurliga.

**Úrslit av spurnarkanning**:

Vit spurdu runt í skulanum um nakar hevði sæð nakrar lundar í Kvívík, men næstan eingin hevði sæð nakran, men ein heviði sæð ein flygva fórbí Kvívík.

**Úrslit av kanningarferð í Kvívík**:

Vit fóru oman í urð at vita um vit sóðu nakrar lundar, men vit sóðu ongar, so fóru vit heim aftur eftir at vit høvdu siti har og hugt í 20 minutur ella okkurt sóvurit.

**Kanning á alnótini**

Við at finnað myndir, av beinagrindini hjá einum lunda, á alnótini, taldu vit okkum fram til, at lundar hava áleið 70-100 bein í kroppinum.

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Vit eru komin fram til at lundar ikki eru í Kvívík, tí at her eru rottur og at teir eru mest har sum har eru berg beint við vatni og har teir kunnu goyma ungarnir í lundaholum.

# 6. SIGIÐ ØÐRUM FRÁ

Vit leggja okkara uppgávu á heimasíðuna hjá Kvívíkar skúla.

# FYLGISKJØL